## DAGSINS MEINING

# Tónleikavinna

Við jøvnum millumbili verður tosað og skrivað um nýggjar og alternativar vinnugreinar í Føroyum. Her verða ferðavinna og KT-vinna oftani nevndar sum vinnur, ið kunnu hava týdning fyri framtíðar føroyska búskapin. Men eisini ein annar vinnumøguleiki verður tikin fram av og á, nevniliga tónleikavinnan.

Tað er einki yvir at dylja, at føroyskur tónleikur hevur ment seg nógv seinastu mongu árini. Útgávan av føroyskum fløgum er økt ár undan ári, og í dag er tað ikki sjáldsamt at hoyra føroyskar tónleikarar fáa rúmd og vera positivt umrøddar í útlandinum. Eivør og Teitur eru flaggskipini í hesum sambandi, men vit hava eisin i mong onnur nøvn sum eitt nú Lena og Týr, Yggdragsil og Sunnleif Rasmussen standa ikki langt aftanfyri. Vit kundu so eisini nevnt mong onnur fræg nøvn frá heimliga pallinum.

Ber ikki til at skapa eina nýggja vinnugrein burtur úr hesum gávaðu fólkum og øðrum við verður spurt. Fleiri frágreiðingar og álit eru gjørd um eina føroyska tónleikavinnu, men meira er tað ikki vorðið til. Tað tykist ikki sum okkara hægstu myndugleikar leggja stórvegis í hetta málið, møguliga tí at her skulu nógvar pengar til og tí at her skal nakað byggjast upp frá botni av. Kanska er kortini ein glotti. Nú Visjónstorg hava verið hildin er tónleikavinnan eisini komin á breddan. Eitt av umboðunum í hesum torgi, sum í sínum dagliga arbeiði hevur til uppgávu at marknaðarføra eitt okkara besta boð uppá føroyskan tónleik uttan fyri landoddarnar, Eivør Pálsdóttir, eftirlýsir eina føroyska tónleikavinnu, har bæði tað almenna men eisini samfelagið sum heild stuðla uppundir – eru við til at kveikja og menna og ikki minst vilja gera íløgur í hesa nýggju vinnuna.

Vit kunnu bara taka fult undir við hugskotinum og ynskinum um at skapa eina føroyska tónleikavinnu, sum er før fyri at gera vart við seg í útlandinum. Til tess er eisini neyðugt at skapa neyðugu karmarnar. Her hómast so ein glotti, nú landsins største kommuna hevur sett sær fyri at skapa eitt mentanarligt og harvið eisini tónlistarligt umhvørvi í Tórsgøtu og var tiltakið Asfalt ein góð byrjan. Nú er at fara víðari og víðka karmarnar eitt nú við at fáa býnum og harvið landinum eina tónlistahøll, har verandi og komandi tónleikarar sleppa at venja, skapa nýggjan tónleik og løg og sleppa at framføra hann fyri almenninginum. Nettupp hetta er eitt av góðu endamálunum við Asfalt.

Ikki kann sigast annað enn, at føroysku miðlarnir hava stuðlað nógv uppundir hesa jaligu gongd, har tónleikurin og tónleikarar fáa størri rúmd og ans. Nú er so at vóna, at okkara fólkavaldu síggja álvaran í hesi tilgongd og gera sítt til at betra um karmarnar og í tí sambandi eisini tora at seta sær nøkur mál og mið – eitt nú hvat krevst av peningi til tess at fremja tey tilmæli teir sjálvir hava biðið nevndir og Visjónsbólkar gera. Øll eru vit tó partur av hesi felags søk so ella so, og her vil Miðlahúsið eisini framhaldandi bjóða seg fram at geva sítt íkast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar um Talgildu heilsuskipanina

JÓANIS ERIK KØTLUM



**Talgild heilsuskipan eitt amboð at geva sjúklingum eina betri tænastu.**

Undirritaði hevur, sum starvsfólk í Almanna- og heilsumálaráðnum arbeitt við verkætlanini Talgild heilsuskipan frá byrjan av í 2003. Eg vil hervið koma við nøkrum viðmerkingum til kjakið, sum í seinastuni, eftir mínum tykki, hevur verið nakað einsíðugt um trúnaðarspurningin og kommunulæknaskipan. Ikki tí hetta eru eisini týdningarmikil viðurskifti, men her skal eg nema við tað, sum eg meti hava stórst týdning tá tosað verður um talgildia heilsuskipan.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur valt at keypa eina integreraða skipan til alt føroyska heilsuverkið. Hví er ein integrerað loysn betur enn at sjúkrahúsini hava hvør sína skipan og kommunulæknarnir hava hvør sína skipan?

Svarið er einfalt, tí at vit seta trygd og kvalitet í viðgerðini av sjúklinginum í sentrum. Vit sum hava arbeitt við verkætlanini (bæði kommunulæknar, sjúkrahúslæknar, onnur heilsustarvsfólk, umsiting og politikarar) eru komin til tað niðurstøðu at ein skipan, sum umfatar allar partar av heilsuverkinum er besta trygd fyri, at sjúklingurin fær eina optimala heilsutænastu.

**Nøkur dømi:**
Nakrir av fyrimununum við eini integreraðari loysn eru:

Tann integreraða loysnin kann geva einum lækna ávaringar, um hann roynir at ordinera heilivág, sum sjúklingurin ikki tolir. Orsøkin kann vera, at sjúklingurin fær annan heilivág frá øðrum lækna, sum ikki eigur at verða tikin saman við tí heilivági, sum læknin ætlar at ordinera.

Ein lækni kann fáa atgongd til upplýsing um sjúklingin, sum møguliga hava týdning fyri tað viðger læknin umhugsar, hóast hesir upplýsingar eru skrásettir av øðrum lækna ella kommunulækna.

Gjørligt veðrur at fáa atgongd til upplýsingar um eitt nú blóðroyndir, sum áður eru tiknar. Sjúklingurin verður tá spardur fyri óneyðug intriv.

Svar kunnu skjótt fáast uppá spurningar, tí ein sleppur frá fyrst at prenta út, senda við posti ella fax, og síðani tøppa upplýsingar inn av nýggjum í aðra skipan.

Omanfyristandandi eru bert nøkur einstøk dømi fyri at skapa lesarin kann skilja, at alternativa valið til Talgildu heilsuskipanina hevur stórar vansar við sær, serliga sæð frá sjúklinginum.

Tað, at Almanna- og heilsumálaráðið hevur valt eina integreraða loysn, ger sjálvsagt tað, at allir starvsbólkar ikki fáa skræddaraseymaðar loysnir, men loysnin vit hava valt verður í skrivandi stund brúkt av 30.000 heilsustarvsfólkum í Svøríki, harav hjá 1.000 -2.000 kommunulæknar. Skipanin hevur tí í verki víst, at hon kann brúkast.

Nú veit eg, at kommunulæknarnir í Svøríki ikki eru løntir á sama hátt sum teir føroysku og at faktureringsamboðið tí ikki er ment, í mun til føroyska tørvin. Men higartil er loysnin bert royndarkoyd, hon er ikki góðkend og arbeiði er eisini sett í gongd við at broyta og menna hana.

Spurningurin er: Skal faktureringsamboðið, sum ikki virkar nøktandi í løtuni, men verður ment og kemur at virka, gera tað, at føroyski sjúklingurin ikki kann fáa stóru fyrimunirnar, sum liggja í integreraðu skipanini, sum dømi er víst á omanfyri? Eg spyrji bara?

Sjálvandi skal alt gerast fyri, at skipanin verður so brúkaravinarlig sum gjørligt og at trygdin, eisini tá um trúnaðin ræður, er í lagi. Hetta er alt nakað ið kann gerast í skipanini, sum keypt er. So kann kjakast um, hvussu hetta skal gerast. Eftir mínum tykki er tað tó ikki ein spurningur um tvørorganisatoriska/integreraða skipan ella ei, eg meini at tað almenna skyldar sjúklinginum eina optimala loysn.

Ført hevur verið fram, at eitt nú kommunulæknarnir í Tórshavnar kommunu kunnu keypa sær eina skipan í felag og síðani integrera hesa við skipanina sum Almanna- og heilsumálaráðið hevur keypt. Henda loysn varð eisini kannað frá byrjan, men komið varð fram til, at hetta á ongan hátt kann gerast ein nøktandi loysn. Hetta er eisini m.a. staðfest í Danmark, har teir hava nýtt hundraðtals milliónir uppá slíkar integratiónir, uttan nøktandi úrslit. Hví gera somu feilir sum onnur hava staðfest tá vit hava møguleikan, at sleppa undan tí?

Harafturat er hetta bæði ein dýrari loysn og ein størri avbjóðing, hvat viðvíkur trygd. Fyri at tala í myndum, so er lættari at hava eftirlit við hvat fer inn og út gjøgnum eina hurð, enn at hava eftirlit hvat fer út og inn gjøgnum fleiri hurðar.

Mín áheitan er, at myndugleikarnir á økinum – kommunur, landstýri og heilsustarvsfólk – í felag arbeiða fyri, at fáa tað besta burturúr tí skipan, sum longu er keypt og framhaldandi menna hesa, okkum øllum at frama.

*Tórshavn 12. juni 2006*

# »Útlendsku føroyingarnir«

EYÐUN Á BORG



Sum føroysklærari hjá ensktalandi útlendingum harmist eg um og átali ta mannminkandi viðferð, summir útlendingar hava fingið í sambandi við uppihaldsloyvi í Føroyum!

Hesi fyrimyndarligu fólk eru við til at gera okkara lítla samfelag ríkari og fjølbroyttari og hava uppiborið eina betri viðferð.

Væl veit eg, at danir hava avgerandi orðið at siga, tá vit tosa um uppihaldsloyvi, men vit í Føroyum hava heldur ikki altíð dugað so væl at handfarið hesi útlendingamál.

Sjálvandi skulu vit hava greiðar reglugerðir í hesum málum, men vit tosa ikki um garvillar, víðgongdar útlendingar, einans hampafólk, bæði ítróttarfólk og onnur, sum t.d. hava fingið føroyskan maka.

Til dømis var tað sera harmiligt og óskiljandi, tá italski Gianfranco mátti stinga í sekkin og fara av landinum, beint eftir at hann hevði gjørt eina orðabók millum italskt og føroyskt mál!?

E.S.! Chiaki! Góða eydnu við ætlanum tínum um orðabók millum japanskt og føroyskt mál!

Við vón um ábøtur!

*á Borg á Argjum 12/06-06*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.